## Timburhandil umbyggjast til keypsmiðdepil

KEYPSMIÐDEPIL

*Vilmund Jacobsen,*

P/F Klaksvíkar Timburhandil, sum nú hevur skift eigarar, skal ætlandi byggjast um til ein keypsmiðdepil.

Eivind Jacobsen, sum er ein av keyparunum, hevur fyrr í vikuni sagt, at ætlanirnar við timburhandlinum sum keypsdepli eru komnar so langt, at fíggingin er komin uppá pláss, og at næsta stigið er at fáa neyðugu loyvini frá Klaksvíkar kommunu.

Sambært Eivindi er ætlanin at flyta timburgoymsluna niðan á Borðoyavík, meðan byggibúðin framhaldandi verður í bygninginum á Stongunum.

- Ætlanin er at leiga restina av bygninginum út til onnur handilsrekandi.

Við umbyggingum verður bygningurin hjá Klaksvíkar Timburhandli 3.000 fermetrar til støddar, og harafturat er ætlanin at gera stóran part av kjallaranum til parkeringskjallara.

Í samrøðu við Norðlýsið sigur Eivind Jacobsen seg einki trúgva upp á ætlanina at byggja ein nýggjan keypsmiðdepil í Klaksvík, sum Norðoya Sparikassi og vinnulívið í býnum standa á odda fyri.

Klaksvíkar Timburhandil seldur:

# Avtalan varð undirskrivað á Høvdanum á Strondum

**Símun á Høvdanum sigur, at samstundis, sum teir nú hava selt timburhandilin, hevur hann valt at stovnað sítt egna felag, Spf. Klips, sum fer at taka sær av keypi og sølu**



EIGARASKIFTI

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

Um 10-tíðina í gjáramorgunin varð sáttmálin um sølu av P/F Klaksvíkar Timburhandli endaliga undirskrivaður.

Keyparar eru Eivind Jacobsen, sum flestu kenna frá P/F Strandamáling á Strondum, Símun Mittún, sum vit kenna frá P/F Klement Petersen í Saltangará og Norðoyagrunnurin.

Teir, sum hava átt Klaksvíkar Timburhandil síðan 1994 – og fram til gjáramorgunin, tá ið avtalan varð endaliga undirskrivað, eru Símun á Høvdanum saman við faðiri og bróðuri sínum.

Soleiðis hevur timburhandilin verið ein familjufyritøka – um vit so kunnu siga.

### Á Høvdanum

Fyri seljararnar við Símuni á Høvdanum á odda var hetta ein søguligur dagur – ella ein søgulig løta, tí undirskrivingin fór nevniliga fram á sjálvum Høvdanum á Strondum, har Símun hevur sínar røtur – og sítt eftirnavn.

Símun hevur leitt Klaksvíkar Timburhandil við hepnari hond, og tá ið hann hevur verið burtur, hevur trímenningurin, Eivind Jacobsen, tikið sær av leiðsluni.

- Tú kemur á vegamót í lívinum, har tú hevur hug at royna okkurt nýtt. Tú velir at taka avgerðir, og í hesum førinum hava vit avgjørt at selja Klaksvíkar Timburhandil til aðrar at reka, sigur hann.

### Egið felag

Símun sigur, at samstundis, sum teir nú hava selt timburhandilin, hevur hann stovnað sítt egna felag, Spf. Klips, sum fer at taka sær av keypi og sølu.

Spurdur, hvat virksemið hjá Klips fer at snúgva seg um, er Símun ikki so ítøkiligur, men vísir á, at hann hevur verið handilsmaður alt sítt lív.

- Eg fari nú niður til Danmarkar aftur og havi góðar stundir at hugsa meg um, hvussu virksemið hjá Spf. Klips skal leggjast til rættis. Í fyrsta lagi fari eg at byggja upp ein kundaskara í sambandi við ætlaða virksemið, sigur Símun.

Fyribils ætlar hann sær at vera í Danmark til einaferð í apríl ella mai mánaða komandi ár.

- Um eg permanent fari at búgva í Danmark, dugi eg ikki at siga í løtuni, leggur Símun á Høvdanum, fyrrverandi eigari av Klaksvíkar Timburhandli, aftrat.

# Fryst upsaflak í Miklagarði fyri 66 kr./kg.

**At fiskimaðurin seinastu árini hevur fingið lítið fyri upsan, sæst ikki aftur í handilsdiskunum í Miklagarði í SMS, har prísurin á frystum uppsaflaki er himmalhøgur**

UPSAPRÍSUR

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

Ein lesari hjá Sosialinum datt herfyri á fryst upsaflak, sum lá til sølu í Miklagarði í SMS. Flakið er pakkað í Danmark, og fiskurin er veiddur her uppi í Norðuratlantshavinum.

Prísurin fyri hesi upsafløk, skræðuleys og beinleys er góðar 66 krónur fyri kilo.

### Slaktarin váttar

Leiðarin á sláturdeildini í Miklagarði, Jørgen Jørgensen, váttar, at hetta er prísurin fyri hesi upsafløk, sum komin eru úr Danmark.

Hann veit eisini at siga, at kiloprísurin á tí, sum danir rópa kolmule, er hin sami sum fyri upsaflakið, nevniliga góðar 66 krónur.

Fiskanavnið kulmule er – um vit vilja tað ella ikki – ikki so lítið villeiðandi.

Røgvi Mouritsen á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at norðmenn kalla svartkjaft kulmule, men tað, sum danir rópa kulmule, er ikki svartkjaftur, men lýsingur, ið er ein fiskur, sum minnir um upsa, men er heldur klænri og blankari á liti.

Lýsingur fæst sjáldan her um okkara leiðir, men syðri á havinum.

### Aftur og fram

Slaktarin í Miklagarði heldur, at upsin og lýsingurin munnu hava koyrt nakað "aftur og fram" í skipanini, og tí er prísurin vorðin so høgur.

Í øllum førum kunnu vit staðfesta, at tað er ikki fiskimaðurin, sum fær millum 2 og 4 krónur fyri kilo fyri upsa, ið gerst ríkur av prísinum, sum "danska" upsaflakið verður keypt fyri í handilsdiskunum í Miklagarði.

Og óhugsandi er heldur ikki, at upsin í Miklagarði er veiddur av føroyskum fiskimonnum, sum hava staðið við kryvjipavnin og brotið vakt, tí næsta hálið longu var undir hekkuni á skipinum.



*Óhugsandi er ikki, at upsin, sum liggur í handilsdiskunum í SMS fyri 66 krónur fyri kilo, er veiddur av føroyskum fiskimonnum, sum hava staðið við kryvjipavnin og brotið vakt, tí næsta hálið longu var undir hekkuni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*